# Greining

## Frá avbjóðing til møguleikar og áræði

Hava tit avbjóðingar, ið tit kenna til, og møguliga hava roynt at fáa loystar, tó uttan at tað eydnast? So kann ein greining av fyritøkuni og mannagongdum helst siga tykkum, hvat kann hjálpa.

Vit eiga at kenna virksemið tykkara væl og virðiliga fyri at kunna gera av, hvussu vit kunnu hjálpa tykkum á besta hátt. Vit gera altíð eina greining av virkseminum fyri at kanna eftir, hvussu vit í felag kunnu fáa betri úrslit og samstundis bæði hækka lívsdygdina hjá kundum ella brúkarum tykkara og arbeiðsgleðina hjá starvsfólkunum.

Í felag kunnu vit finna útav, hvørjar týdningarmiklar avbjóðingar, tit hava fyri framman sum organisasjón ella leiðsla, og hvar teir heilt stóru møguleikarnir fyri ábótum eru at finna. Saman kunnu vit finna útav, hvørji framtíðarmál eru passaliga eggjandi og samstundis møgulig at náa.

Við støði í greiningunum kunnu vit semjast um, hvørji átøk vit eiga at seta í verk, og hvar best er at seta skjøtil á. Tað ræður um at brúka starvsfólk, pening og orku so skilagott, sum tilber.

- Hvørjar eru størstu avbjóðingarnar – og hvørjir eru bestu møguleikarnir?
- Hvussu stór, men realistisk mál, kunnu vit seta fyri fyritøku tykkara?
- Hvussu hækka vit á bestan hátt tykkara tænastustøði?
- Hvussu kunnu vit best skapa úrslit, lívsdygd og arbeiðsgleði?

## Hvørji eru vit í **Leiðsluhúsinum ?**



**Eyðbjørn Poulsen**
Eydbjorn@lh.fo
Tel: 230060



**Torben Nielsen**
torben@lh.fo
Tel: 230066



**Rolf Herup Olsen**
rolf@lh.fo
Tel: 230067



**Elin Michelsen**
elin@lh.fo
Tel: 230063

# Viðmæli Greining

## Greiningin var grundarlagið undir tí loysn, ið gav kundunum hjá Tjaldurs Apotekið styttar bíðitíðir

**Bakgrund**
Á heysti í 2010 avgjørdu vit á Tjaldurs Apoteki, at vit vildu gera nakað við longu bíðitíðirnar sum kundar okkara upplivdu. Hesar komu fyri bæði tá tey skuldu heinta heilivág við resept, og tá tey skuldu hava hondkeypsvørur. Vit høvdu í huga at broyta arbeiðshættir, umframt at vit vildu økja um samstarvið í organisasjónini sum heild, soleiðis at arbeiðsumhvørvið kundi gerast betur.

**Greining**
Vit settu okkum í samband við Leiðsluhúsið og bíløgdu eina greining. Henda greining segði okkum, at vit kundu fáa eina skjóta og smidliga handfaring av reseptum, um vit nýttu ymisk Lean amboð. Tey komu eisini við uppskotum um, hvørji átøk vit burdu farið undir.

**Menningartilgongd**
Starvsfólkini á Tjaldurs Apoteki vóru við til at skapa eina nýggja uppseting í handlinum, og handfaringin av reseptum varð deild í tvey flow, alt eftir, um kundin skuldi hava tvær ella fleiri vørur. Kundin skal ikki longur taka eitt nummar, um hann bert skal hava handkeypsvørur. Hetta er gjørt um til eina bíðirøð, har fleiri kassar skjótt kunnu lata upp, um tørvur er á tí.

**Úrslit**
Kundar hava merkt ein stóran niðurskurð í bíðitíð, sum fyrr kundi vera upp til 20 minuttir. Í dag er ikki ofta, at bíðitíðin er longur enn 5 minuttir.
Eisini uppliva kundarnir í dag eitt hægri tænastustøði, eins og starvsfólkini hava fingið betri og tryggari karmar at arbeiða innan, við verksetingini av broyttari skemalegging.

> "Ein stór hugburðsbroyting er hend hjá starvsfólkunum, og arbeiðsplássið er broytt til tað betra"

Kristina Ejdesgaard, deildarleiðari